# Kallkyn í Vágsbotni

# RESTÚTSØLAN

**byrjar leygardagin 4. februar opið er til kl. 16.00**

Sosialurin 341800

## Fulltrúi hjá Løgtingsins umboðsmanni

Í sambandi við barsilsfarloyvi er eitt tíðaravmarkað starv sum avloysari fyri fulltrúa hjá Løgtingsins umboðsmanni leyst at søkja. Starvið verður sett skjótast gjørligt fyri tíðarskeiðið fram til 31. des. 2006.

**Embætið**
Umboðsmaðurin, ið virkar sambært løgtingslóg nr. 60 frá 10. mai 2000, fór undir virksemi sítt 1. mai 2001. Uppgávan hjá umboðsmanninum er at hava eftirlit við almennu fyrisitingini undir heimastýrinum, herundir at viðgera klagur frá borgarunum um avgerðir v.m. Á skrivstovuni starvast dagliga umframt umboðsmannin, tveir løgfrøðiligir ráðgevar og ein skrivstovufulltrúi.

**Uppgávurnar**
Arbeiðsuppgávurnar verða í høvuðsheitum:

- fyrireiking og viðgerð av innkomnum klagum
- uppgávur í sambandi við eftirlitskanningar av málsviðgerðini á útvaldum økjum, og
- kunningarvirksemi um fyrisitingarlig evni og um virksemið hjá umboðsmanninum.

Talan er um eitt rættiliga avbjóðandi starv í tøttum samstarvi við umboðsmannin.

**Setanartreytir**
Tann, sum settur verður, skal hava prógv sum løgfrøðingur. Stórur dentur verður harumframt lagdur á royndir eftir lokna útbúgving, og er tað ein fyrimunur, um viðkomandi hevur starvsroyndir innan almennu fyrisitingina.

Lønin er sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Búskapar- og Løgfrøðingafelag Føroya. Møguleiki er fyri setan sum ráðgevi, um førleikin og royndirnar eru til tess. Tann, sum settur verður, má tola møguligar broytingar í arbeiðsuppgávunum.

**Umsóknir**
Umsóknir við avriti av prógvum v.m. skulu verða umboðsmanninum í hendi **í seinasta lagi mánadagin 6. februar, kl. 12.** Adressan er:

**Løgtingsins umboðsmaður**
Traðagøta 43
Postsmoga 2008
165 Argir

Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði. Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Sólju í Ólavsstovu, umboðsmann ella Johnhard Klettheyggj, ráðgeva á tlf. 358500.

## Skrivstovufólk

Søkt verður eftir fólki við skrivstovuútbúgving at arbeiða við málsviðgerð í lønarmálum

**Arbeiðsuppgávur**

- Avgreiða fyrispurningar um lønar- og setanarviðurskifti
- Málsviðgerð
- Fyrireika sáttmálasamráðingar
- Luttaka í sáttmálasamráðingum
- Skriva fundafrásagnir

**Starvið**
Talan er um eitt starv, har tú fært eina miðvísa upplæring, bæði praktiska á Lønardeildini og á skeiðum.

Tann praktiska upplæringin er skipað á tann hátt, at tú í fyrstuni arbeiðir undir leiðslu og umsjón av einum fulltrúa. So hvørt sum tú mennist í starvinum, verða uppgávurnar meira sjálvstøðugar, og at enda arbeiðir tú sum málsviðgeri og hevur sjálvstøðuga ábyrgd av einum ella fleiri málsøkjum hjá deildini.

**Lønar- og setanarviðurskifti**
Lønar- og setanarviðurskifti eru eftir sáttmálanum við Starvsmannafelagið. Tú byrjar í lønarflokki 2, og so hvørt tú mennist og hevur tikið viðkomandi skeið o.a., verður tú flutt/ur upp í lønarflokk. Eftir uml. 3 árum endar tú í lønarflokki 3, og fært tú tá starvsheitið yvirassistentur. Seinni er møguleiki at verða útnevndur til skrivstovufulltrúa í lønarflokki 4, um tú hevur ment teg so mikið, at tú ert vorðin serfrøðingur innan okkurt av arbeiðsøkjunum, og tú samstundis situr við sjálvstøðugari ábyrgd av málsøkjum. Hevur umsøkjarin royndir frá líknandi starvi, kann viðkomandi verða flokkaður beinleiðis í lønarflokk 3 ella 4.

Umsókn við prógvum og møguligum viðmælum skal verða send
Fíggjarmálaráðnum
Lønardeildini
Postboks 2039
165 Argir

Umsóknin skal vera á Lønardeildini í seinasta lagi tann 20. februar í 2006
Vilt tú vita meira um starvið, kanst tú ringja til stjóran, Snorra Fjallsbak, á tlf 35 22 00.

## Til sølu

Allar maskinur og alt innbúgv hjá Snikkaravirkinum í Grønlandi verða lýst tilsølu.

Her er góður møguleiki at gera kvetti.

tel. 211 211

## Frá Miðvágs Arbeiðarafelag

Ársaðalfundurin verður 3. mars.

**Nevndin**

## Útróðrarbátur til sølu

Um hóskandi boð fæst verður útróðrarbáturin M/B »Osla«, Norðdepli, hervið lýstur til sølu við øllum rættindum og loyvum, 106 fiskidagar.

**Áhugað kunnu ringja á tlf. 221489 ella 220086**